

Tað er minni at gera hjá boripallum á norska landgrunninum. Mynd: Harald Pettersen/Statoil

# Farnir úr sjey til tveir boripallar í Noregi

Jógvan Hugo Gardar

22.07.2015 - 07:45

Oljan.fo

Transocean er eitt av teimum feløgunum sum hevur merkt best broytingarnar í oljuídnaðinum. Fyri einum árið síðani hevði Transocean sjey boripallar í arbeiði á norska landgrunninum. Nú eru tað beir tveir av teimum sum hava avtalur sum eru at tosa um, skrivar offshore.no.

So hvørt sum oljuprísurin er lækkaður og oljufeløgini hava sett í verk sparingar, so eru boripallarnir hjá Transocean farnir úr virksemi.

Polar Pioneer og Transocean Leader eru fluttir úr norskum sjógvi til uppgávur aðrastaðni. Transocean Spitsbergen liggur vágbundin í Averøy í Kristiansund. Transocean Barents og Transocean Searcher eru eisini á veg til at vágbindast.

Hetta er støðan hjá teimum sjey Transocean-boripallunum, sum fyri einum ári síðani vóru til verka á norska landgruninum:

***Transocean Spitsbergen*** *– einki at gera – liggur vágbundin í Noregi*

***Transocean Searcher*** *– avtalan gongur út í juli 2015 – er í Noregi*

***Transocean Barents*** *– avtalan gongur út í september 2015 – er í Noregi*

***Transocean Arctic*** *– hevur avtalu til juni 2016 – er í Noregi*

***Transocean Winner*** *– hevur avtalu til juni 2016 – er í Noregi*

***Polar Pioneer*** *– hevur avtalu til juni 2017 – er í Alaska*

***Transocean Leader*** *– hevur avtalu til juni 2019 – er í bretskum sjógvi*

Síðani pallmarknaðurin fór at krympa hava 550 starvsfólk mist arbeiði hjá Transocean